# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Sára fór við gullinum

**Eitt gull og eitt silvur fingu føroysku talvgenturnar, Sára Traber Olsen og Herborg Hansen, tá tær vóru við í danmarksmeistaraheitinum í talvi fyri gentur um vikuskiftið**

TALV
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Farna vikuskiftið fóru trígg-ir føroyingar til Danmarkar at taka lut í danmarksmeistaraheitinum fyri gentur í talvi. Talan var um Herborg Hansen úr Klaksvík, sum skuldi royna at verja danmarksmeistaraheitið, hon vann í fjør, Sáru Traber Olsen úr Havnini og Eyð Traber, sum var við teimum báðum gentunum á ferðini.

Kappingini var í einum lítlum bíði tætt við Århus á Jútlandi, og ikki kann sigast annað enn, at føroysku luttakararnir fingu stak góð úrslit í kappingini. Teir komu nevniliga heim við einum gullheiðursmerki og einum silvurheiðursmerki.



*Sára Traber Olsen úr Havnini vann um vikuskiftið danmarsmeistaraheitið í talvi fyri gentur. Herborg Hansen var eisini við í kappingini, og hon fekk eitt silvurheiðursmerki.*

### Herborg var tætt við

Kappingin var skipað á tann hátt, at har vóru seks bólkar frá A til F, sum vóru býttir upp eftir aldri. Telvararnir skuldu telva fýra talv leygardagin og trý talv sunnudagin, og hvør telvari fekk ein hálvan tíma fyri hvørt talvið.

Herborg Hansen, sum vann DM í fjør, var partar av næstelsta aldursbólkinum í fjør, men í ár var hon farin upp í elsta bólkin. Hon hevði tó góðar vónir undan kappingini, og úrslitið hjá Herborg var eisini sera gott. Hon vann fimm talv og tapti tvey, og við hesum góða úrsliti endaðu hon og ein donsk genta javnar á fyrsta plássi við fimm stigum. Tíverri fyri Herborg, so hevði danska gentan betri mótstøðustig, og hetta gjørdu, at hon fór avstað við gullinum, meðan Herborg mátti taka til takkar við silvurheiðursmerkinum á hesum sinni.

### Sára endaði ovast

Ein onnur føroysk genta var eisini við í kappingini um vikuskiftið. Sára Traber Olsen var við í bólki D, sum er fyri gentur undir 12 ár, og hennara úrslit gjørdist eisini sera gott.

Hon telvaði væl ígjøgnum kappingina, og undan seinasta umfarinum lá hon einsamøll á odda, eitt hálvt stig frammanfyri nummar tvey. Sára tapti tó í seinasta umfarinum, og hetta gjørdi, at tvær aðrar gentur løgdu seg undir liðina á henni á stigatalvuni við fimm stigum. Heldigvís fyri Sáru, so hevði hon bestu mótstøðustigini, og hetta gjørdi, at hon vann danmarksmeistaraheitið í talvi.

So sjálvt um Herborg Hansen ikki megnaði at endurvinna danmarsmeistaraheitið, so fingu føroyingar allíkavæl ein nýggjan meistara heim við til Føroya.

Eyð Traber var við á ferðini, og hon var sum vera mann glað fyri úrslitið hjá føroysku telvarunum.

- Vit eru sera væl nøgd við úrslitini hjá teimum báðum. Eitt gullheiðursmerki og eitt silvurheiðursmerki er sera gott. Túrurin var eisini avbera góður, so tað er ikki so gali. Harafturat kann líka leggjast afturat, at Herborg var óheppin í tí eina talvinum, sum hon tapti, tí hon kom í tíðarneyð. Hevði hon vunnið hetta, so høvdu báðar helst fingið gullheiðursmerki, segði Eyð at enda.

Hvussu er og ikki, so kann man ikki siga annað enn, at føroysku telvararnir kláraðu tað avbera væl í danmarksmeistaraheitinum.

# Eg misti høvdið

**- Tað er trupult at vera nøgd við eitt næstbesta pláss, tá ið eg kiksaði soleiðis í endanum, sigur ein skuffað Herborg Hansen eftir DM í talvi**

TALV
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Herborg Hansen úr Klaksvík er júst heimafturkomin frá DM í telving, har hon gjørdist meistari í fjør. Eins væl gekk tó ikki í ár, hóast hon bert var sekund frá frálíku endurtøkuni.

Fyri aðru ferð uppá tvey ár luttók 16 ára gamla Herborg Hansen úr Klaksvík í DM í telving. Í fjør gjørdi hon ikki mætari enn at vinna danska meistaraheitið. Tað var upp á hangandi hár, at hon endurtók meistaraheitið í ár, men tíverri glapp á stokkinum hjá henni. Hon tapti avgerandi talvið ímóti donsku Louise Højen.

- Eg kom best frá byrjan og hevði sigurin í hondini. Men eg varð sett undir tíðarpress í endanum av talvinum, av tí at eg hevði telvað so varliga, og hetta kostaði mær sigurin, sigur Herborg.

### Vónbrotin av silvuri

Danmarksmeistaraheitið varð telvað í lítla býnum Hornslet, ið liggur beint við Århus. Hóast hon fekk flotta silvurheiðursmerkið við til Føroya, er hon skuffað.

- Tað er trupult at vera nøgd við eitt næstbesta pláss, tá ið eg kiksaði soleiðis í endanum, sigur ein skuffað Herborg.

Herborg er avgjørd, tá ið hon verður spurd um, hví hon tapti tann tætta dystin í endanum.

- Eg misti høvdið. Eg fekk ikki konsentrerað meg nokk til at vinna, sigur talentið úr Klaksvík.

Tó kann Herborg frøast um at hava telvað seg til NM seinni í ár, sum somuleiðis fer fram í Danmark. Næsta kapping á skránni er FM, ið verður telvað á páskum.



*Herborg Hansen snávaði í seinasta talvinum um Danmarksmeistaraheitið*